## Rás2 hýsir 3. hálvleiki

Rás2 fór í gjár undir nýggja ítróttarsending, sum verður send sunnudagar frá kl. 17.00 til 19.00. Í sendingini verður tikið saman um dystirnir í Formuladeildini, tosað verður við spælarar, venjarar og onnur, og fólk kunnu eisini senda sms-boð til sendingina. Heri Simonsen verður vertur í studionum, hann fer at hava gestir á vitjan, og ringt verður til fólk kring landið.



## AaB heldur fast

AaB liggur framvegis á odda í superliguni, eftir at enn eitt umfar varð spælt um vikuskiftið. AaB hevði truplan útidyst ímóti Brøndby, men tað eydnaðist teimum úr Aalborg at vinna 1-0. Málið gjørdi Thomas Augustinussen. Jón Rói Jacobsen spældi um vikuskiftið við eykaliðnum hjá AaB, sum vann 3-2 á Næsby, eftir at liðið hevði verið aftanfyri 2-1.

# Gullkvinnurnar staðfestu sína støðu

**Føroyameistararnir úr KÍ staðfestu sína støðu sum besta føroyska kvinnulið, tá tær koppaðu nærmastu kappingarneytarnir frá í fjør í Djúpumýri í gjár**

KVINNUFÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*

Fyrsti stórdysturin hjá kvinnum var um vikuskiftið, tá B36 vitjaði føroyameistararnar úr KÍ í gjár. Klaksvíkskvinnur rópa seg ikki føroyameistarar fyri einki, og aftur í gjár staðfestu tær sína støðu sum bestu kvinnuliðið í føroyskum fótbólti. Rannvá Andreasen og Doris í Garði stóðu fyri málunum, tá tær úr Klaksvík koppaðu teimum næst bestu frá farna kappingarári.

Dysturin var tættur, og gestirnir smæddust als ikki. Tær høvdu møguleikar at leggja seg á odda, men tóku ikki av. Einstaklingurin Rannvá Andreasen syrgdi fyri, at KÍ legði seg á odda, tá seinni hálvleikur var átta minuttir gamal. Klaksvíkskvinnur høvdu ongar veruliga málmøguleikar, men tær revsaðu gestunum so dyggiliga. Doris í Garði avgjørdi dystin, tá hon var hægst eftir hornaspark og stýrdi bóltin í málið. Tá restaðu 10 minuttir.

Tveir aðrir dystir vóru í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið. Í Vági vunnu argjakvinnur heili 5-1 á VB/Sumba, meðan nýggja felagsliðið, Víkingur, vann við tveimum málum móti ongum á útivølli móti Skála.



*KÍ vann fyrstu uppgerðina ímóti B36 í hesum kappingarárinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fyrsti landskappingardystur hjá Víkingi

**Í kvøld verður fimti og seinasti dysturin í fyrsta umfari av Formula deildini, og er tað Víkingur, ið spælur móti einum øðrum Eysturoyarliði. Talan er um B68-liðið av Toftum. Dysturin verður spældur í Sarpugerði í Gøtu, og verður hann bríksladur í gongd klokkan 18:00 í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð í søgu felagsins fer Víkingur at spæla landskappingardyst, og hvat man vera betur enn at byrja á heimavølli. Klokkan 18:00 fer fyrsti landskappingardysturin hjá Víkingi av bakkastokki, og er har talan um dyst móti B68.

### Fortreytirnar

B68 vann sær í síðsta kappingarári luttøku til Formula fótbólt við at vinna 1. Deild heili 11 stig framman fyri nummar tvey, meðan tað hinvegin er eitt sindur øðrvísi hjá heimaliðnum. Víkingur er nýtt felag í Føroyum, og er tað úrslit av samanlegging av feløgunum GÍ og LÍF, ið ávíkavist spældu í Formula og 1. Deild í síðsta kappingarári. Í báðum førum var talan um eitt fimta pláss, og fekk GÍ 38 stig, meðan LÍF fekk 43 stig.

Tá hugsað verður um fortreytirnar, má man siga, at nýggja liðið Víkingur hevur ein lítlan favoritt status, hóast man als ikki skal avskriva nýliga uppfluttu B68.

### Styrkur í báðum borðum

Á báðum liðunum í kvøld er talan um styrktir hópar, og millum annað hava bæði liðini leitað sær til Brasiliu. Víkingur tók enntá stigið til at fáa sær venjara úr Brasilia, men tá hesin ikki hevði neyðugu pappírini í lagi, varð hesin ikki førur fyri at røkja sítt starv, og noyddist av landinum aftur.